

*Ikki færri enn 8 ymiskir møguleikar til loysn av ferðsluviðurskiftunum í Leirvík vóru nevndir á kunnandi fundinum hóskvøldið, sum Leirvíkar kommuna skipaði fyri. Flestu leirvíkingar eru samdir um, at ferðsluviðurskiftini í bygdini eiga at fáast uppá pláss, áðrenn Norðoyatunnilin letur upp*

# Eiga at sláa kalt vatn í blóðið

**Seinasta hóskvøld skipaði Leirvíkar kommuna fyri kunnandi fundi í Bygdarhúsinum um veganetið og ferðsluna í Leirvík, nú ætlaninar við Norðoyatunnlinum nærkast. Leirvíkingar hava stóran áhuga fyri, hvussu ferðsluviðurskiftini í bygdini verða loyst**

SAMFERÐSLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Løgtingið hevur samtykt, at tunnil skal gerast undir Leirvíksbygd, men sum skilst, liggur hetta arbeiði væl longur frammi enn verkætlanin við Norðoyatunlinum. Tískil hevur spurningurin tikið seg upp, hvussu verandi veganet í Leirvík fer at megna at taka ímóti 2000-3000 bilum fleiri um dagin, tá ið Norðoyatunnilin er liðugur.

Eini 250-300 fólk vóru á kunnandi fundinum hóskvøldið, og tað merkir, at rættiliga stórur áhugi er millum leirvíkingar, hvussu málið við ferðsluni verður loyst.

Bygdaráðsformaðurin í Leirvík, Sjúrður Eliasen, sigur í stuttari viðmerking, at tað fyriliggur bert ein samtykt um veganetið í bygdini, og hon er, at tunnil skal gerast í Leirvík, sum skal leiða nógvu ferðsluna, sum fer at standast av Norðoyatunlinum, úr sjálvari bygdini.

## Fleiri uppskot

Leirvíkingar, sum Sosialurin hevur tosað við eftir fundin, siga, at fleiri uppskot vóru frammi á fundinum um, hvussu trupulleikin við ferðsluni kann loysast.

- Men tað, sum órógvar okkum, er, at hesi viðurskifti eftir øllum at døma ikki verða loyst, fyrr enn eftir, at Norðoyatunnilin er komin. Tað merkir, at Leirvíksbygd, soleiðis sum hon nú er, noyðist at taka ímóti allari ferðsluni í eitt, tvey ella fleiri ár – alt eftir, nær farið verður undir at gera nakað við hesi viðurskifti.

Leirvíkingar vísa á, at tað eru ikki teir, sum eru heitir fyri Norðoyatunlinum, men í fyrsta lagi fólk í Norðoyggjum.

- Okkara áhugi er ikki tunnilin undir Leirvíksfirði, men veganetið í Leirvík eftir, at tunnilin er komin.

Fólk í Leirvík halda, at tá ið klaksvíkingar kunnu draga ætlaninar út við at togast um lendið, vildi tað ikki verið so undarligt, um leirvíkingar í størri mun strongdu meira á at fáa ferðsluviðurskiftini uppá pláss, áðrenn tunnilin kemur.

## Ongan skund

- Tað eru ikki vit, sum streingja á at fáa fast samband um Leirvíksfjørð. Vit hava ongan skund.

Leirvíkingar standa spyrjandi eftir kunnandi fundin, tí á fundinum vóru ikki færri enn fýra møguleikar frammi um tunnil og fýra møguleikar um vegagerð í staðin fyri tunnil.

- Nú spyrja mong, hvør loysnin verður – og nær hon verður veruleiki?

Tað undrar fólk Leirvík, at hond ikki verður tikin um ferðsluviðurskiftini í bygdini, fyrr enn 1-2 ár eftir, at Norðoyatunnilin er vorðin veruleiki.

- Sum vit hava skilt, verður eingin játtan til tunnils- ella vegagerð í Leirvík fyrr enn í 2006 ella 2007, um alt gongur sum ætlað. Men hvussu verður, um samfelagsgongdin broytist, og minni peningur verður at arbeiða við? Nær kunnu vit tá rokna við, at hetta málið verður loyst – um tað ikki verður loyst, samstundis sum Norðoyatunnilin verður bygdur?

## Kalt vatn…

Flestu leirvíkingar eru samdur um, at ferðsluviðurskiftini í Leirvík eiga at fáast uppá, áðrenn Norðoyatunnilin letur upp.

- Vit eiga at sláa kalt vatn í blóðið. Hevur samfelagið ikki ráð at syrgja fyri tryggum ferðsluviðurskiftum í Leirvík, hava vit heldur ikki ráð at byggja Norðoyatunnilin.

Men, siga leirvíkingar:

- Kanska eru vit longu ov seinir á sjóvarfallinum.

Sosialurin fer at venda aftur til málið um ferðsluviðurskiftini í Leirvík.


## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu og rættu nógvar hjálpandi hendur, tá kæri pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Sámal Petur Lognberg**
**Skopun**

andaðist.

Tøkk til tykkum á Sambýlinum á Skerinum í Skopun, at tit vóru so góð við pappa, tøkk til sjúkrasystrarnar, tøkk til Jákup Reinert Hansen prest fyri troystarrík orð í kirkjuni.
Tøkk til tykkum, sum fylgdu honum til tað seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Børnini**


# Tordur 20 ára starvsdag

MÓTTØKA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tordur J. Niclasen hevur verið fyristøðumaður á Eysturoyar Røktar-og Ellisheimi í 20 ár.

Hendan dagin ætlar stýrið fyri heimið ikki at lata fara aftur við borðinum uttan nakað.

Í samband við dagin, verður skipað fyri móttøku á Røktar- og Ellisheiminum í Runavík mikudagin, 1 oktober frá kl. 16.

Øll eru vælkomin at heilsa fyristøðumanninum.



*Tordur J. Niclasen hevur nú verið fyristøðumaður í 20 ár*



# Hevði hassj í viðførinum




**Ein 47 ára maður var handtikin av løgregluni um vikuskiftið fyri at hava 800 g av hassji í viðførinum**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Maðurin varð funnin uttanfyri terminalin á flogvøllinum í Vágunum. Men Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini, sigur, at onki týðir uppá, at maðurin skuldi við flúgvaranum.

– Maðurin var avdottin, og í viðførinum hjá honum vórðu so 800 g av hassji funnin.

Maðurin varð skuldsettur og fór fyri rættin mánamorgunin.

Annars eru tvey máli komin fyri í rættinum, sum hava bíðað í eina tíð nú. Málið við danaum, sum smuglaði 20 kg av hassji, kom somuleiðis fyri í rættinum mánamorgunin. Og seinnapartin skuldi so málið um tveir italienarar, sum vórðu ákærdir fyri neyðtøku av eini 15 ára gamlari gentu, koma fyri í rættinum.

# Harðskapur og rúsdrekkakoyring

**Løgreglan í høvuðsstaðnum hevur ikki havt so nógv at gera um vikuskiftið, men onkrir tilburðir hava kortini verið**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Løgreglan hevur tikið tveir bilførarar í vikuskiftinum fyri at koyra ávirkaðir. Tann eini varð tikin leygarnáttina um eitt tíðina.

– Hann blásti 1,14 ‰, og verður skuldsettur fyri rúsdrekkakoyring, sigur vakthavandi. Hin bilførarin varð tikin sunnumorgunin um fimmtíðina. Hann hevði 1,94 ‰, og harafturat hevði viðkomandi onki koyrikort. So tað fær hann eisini eina bót fyri.

Leygarnáttina fekk løgreglan eina fráboðan um harðskap í býnum. Ein maður var sligin og sparkaður bæði í høvdið og kroppin. Hann varð fluttur á Landssjúkrahúsið. Hann fekk nakað av skaða. Millum annað hevði hann brotið tvær tenn. Løgreglan veit, hvør framdi harðskapin, og hesin verður skuldsettur fyri harðskap.

Løgreglan í Klaksvík tók somuleiðis ein bilførara í vikuskiftinum fyri at koyra við kenning.

Fríggjadagin fór sjúkrabilurin til Norðdepils eftir einum manni, sum var dottin úr einum stiga.

– Sum skilst so fekk maðurin nakað av skaða, men hetta var sum so ikki eitt løgreglumál. Men hann var so fluttur á Klaksvíkar sjúkrahús, sigur vakthavandi, sum annars leggur afturat, at tað hevur verið stak friðarligt í Klaksvík um vikuskiftið.

# Rætting

Herfyri stóð grein í blaðnum um buffét á Pizzaria Napoli í Klaksvík. Í greinini varð endurtikið fleiri ferðir, at onki matstað hevði verið opið í døgurðatímanum í eina tíð. Men fleiri hava gjørt vart við, at hetta ikki er rætt. Klaksvíkar Sjómansheim hevur havt opið í mong ár og bjóðað fólki heitan mat í døgurðatímanum. Og tað gera tey enn.

Undirritaða tekur fulla ábyrgd fyri hetta mistakið og biður lesararnar orsakað.

**- sae -**


Langt vikuskifti frá hósdegi til mánadag




Njótið eitt langt vikuskifti frá hósdegi til mánadag í Aberdeen á einum av okkara frálíku gistingarhúsum.

**Patio** ★★★★
Vælumtókt gistingarhús við svimjihyli, venjingarrúmi, góðari matstovu og hugnaligari barr. Beint við Beach Boulevard.
Fyri hvønn í tvímanskamari **Kr. 2.995**

**Brentwood** ★★★
Hugnaliga gamla gistingarhúsið beint við Union Street við teimum fryntligu starvsfólkunum.
Fyri hvønn í tvímanskamari **Kr. 2.830**

**Skene House Rosemount** ★★★
Ráð tær sjálvum í eini íbúð við øllum hentleikum.
3 rúm (6 fólk). Fyri hvønn **Kr. 2.700**
2 rúm (4 fólk). Fyri hvønn **Kr. 2.750**
1 rúm (2 fólk). Fyri hvønn **Kr. 3.020**

**Ramada Jarvis** ★★★
Liggur mitt í meldrinum í Market Street.
Fyri hvønn í tvímanskamari **Kr. 2.750**

Íroknað: Flogferð við ferðaavgjøldum og innivist í 4 nætur við morgunmati.

SANSIR 355 355

Tú kanst bíleggja tína ferð hjá Atlantic Airways á telefon 34 10 40, 34 10 58 ella hjá tínari ferðaskrivstovu.

ATLANTIC AIRWAYS
Tel: 34 10 10 · Faks 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo